*Eg havi verið við havsins botn og stundum uppi við sý**

† *Mortan Nolsøe*

Sum skilst av navninum á fyrilestri mínum, er evnið í honum knýtt at *Gongurólvskvæði,* tað er kvæði nummar 29 í *Føroya kvæðum* hjá Svend Grundtvig og Jørgen Bloch.

Gongurólvskvæði hoyrir til tann meginbólk av dansiyrkingum okkara á føroyskum máli, ið verður nevndur kappakvæði, serliga tá ið hugtakið kappakvæði verður tikið í víðu merking síni. Sum kappakvæði skilst her slíkur frásagnarskaldskapur av manna munni, sum í kvæðalíki, eisini nevndum balladuformi, greiðir frá reystmennum, ið hava livað – ella ætlast at hava livað – í fornøld og helst fjart burtur í øðrum londum, og frá avreksverkum teirra. Eyðkent fyri kappakvæðastílin er millum annað, at lýsingarnar av persónum og tilburðum eru gjarna nógv avgjørdar ella hava ævintýrdám. Hetjan í kappakvæðum er fremst millum kappar, annaðhvørt hon roynir seg á leikvøllum í friðarligum kappingum ella í bardaga móti fíggindum av mannakyni ella av trøllakyni. Gongurólvskvæði hoyrir til hetta seinna slagið av kappakvæðum, ið tí av summum, serliga norskum, fólkavísugranskarum verður nevnt »trollviser«, eitt hugtak sum vit á føroyskum kunnu endurgeva sum trøllakvæði.

Gongurólvskvæði varð skrivað upp her á landi seint í 18. øld og serliga í fyrru helvt av 19. øld. Høvuðstekstirnir av tí eru til skjals í Føroya kvæðum við stavsetingini hjá Hammershaimb. Í tí handritaða verkinum hjá Grundtvig og Bloch standa teir í 3. bindi, í teirri prentaðu útgávuni av sama verki hjá Christian Matras og Napoleon Djurhuus standa tær í 1. bindi. Tekstirnir har eru 6 í tali. Teir hava ferreglaðan ørindisform og eru skipaðir í frábrigdi, nevnd við stórum bókstøvum: A, B, C, D, E og F, mest eftir uppskrivingaraldri. Um keldurnar ella heimildirnar hjá hesum frábrigdum kann upplýsast:

A-frábrigdið finst í minna kvæðahandritinum hjá Jens Christian Svabo, sum eftir Christian Matras man hava skrivað tað í 1770-árunum, – onkuntíð eftir 1773[1]. Uppskriftin, sum hevur 125 ørindi, tykist eftir málføriseyðkennum sínum at vera úr Suðuroy.

B-frábrigdið finst í størsta kvæðahandritinum hjá Svabo frá 1781-82 og hevur 104 ørindi.

*) Fyrilestur hildin á Fróðskaparsetri Føroya 25.3.1984.

Fróðskaparrit 34.-35. bók (1986-87): 5-22

C-frábrigdið – tað er Ca-teksturin – varð skrivað av Jóannesi í Króki í 1822 eftir Mikkjali Tummassyni á Sandi. Tað hevur 140 ørindi og finst í Sandoyarbók. – Viðmerkjast skal her, at Jóannes í Króki í 1848 gjørdi eina aðra og longri uppskrift av kvæðinum við 151 ørindum, men at henda uppskrift, ið verður nevnd Cb, er mær vitandi ikki vorðin prentað sum heild, tó at hon við sínum frávikum er serliga áhugaverd fyri granskingina av kvæði okkara.

D-frábrigdið finst í Fugloyarbók, sum er eldri enn 1854. Teksturin har hevur 92 ørindi.

E-frábigdið hevur Hammershaimb skrivað upp í 1853 eftir Ólavi Ólavssyni í Hvannasundi og telur 103 ørindi.

F-frábrigdið finst í kvæðabókini hjá Napoleon Nolsøe lækna í 2. bindi (1842), og eisini í Koltursbók. Henda uppskriftin er 140 ørindi.

Viðvíkjandi teirri vísindaligu útgávuni av kvæði okkara kann nevnast aftur at tí, sum longu er sagt um tekstirnar í Føroya kvæðum, hetta. Frábrigdini A og B hjá Svabo hevur Christian Matras latið prentað stavrætt í útgávu síni av »Svabos færøske Visehaandskrifter« (1937-39). Frábrigdið Ca hjá Jóannesi í Króki er prentað, somuleiðis stavrætt, í teirri samskipaðu útgávuni hjá Rikard Long av Sandoyarbók[2].

Fyrstu ferð, ið Gongurólvskvæði kom á prent, var í »Færöiske Kvæder«, 2. parti (1855), hjá Hammershaimb. Her hevur Hammershaimb ikki hildið seg bara til ein tekst og endurgivið hann óbroyttan, men hann hevur bøtt ella endurbøtt A-frábrigdið hjá Svabo við lánum úr øðrum frábrigdum av kvæðinum. Úrslitið av broytingum hansara er, at teksturin hjá honum telur 131 ørindi móti teimum 125 hjá Svabo. Jóannes Patursson hevur í savninum »Føroysk kvæði um brøgd Norðmanna ættarinnar úti og heima«, ið kom út í 1925 og verður manna millum mest nevnt »Gyltabók«, prentað kvæðið eisini eftir A-frábrigdinum hjá Svabo, men í einum øðrum broyttum líki, soleiðis at ørindatalið er vorðið 123 – ella 2 ørindi færri enn hjá Svabo. Samanborið við tekstin hjá Hammershaimb hevur teksturin hjá Jóannesi bónda 8 ørindi færri, og er hetta samstundis eitt talandi dømi um, hvussu ymisk úrslitini kundu vera av tekstbøtingarroyndum, sum enntá byggja á sama høvuðstekst. Við tað at báðar tær nevndu bøkurnar hava verið nógv brúktar at læra seg kvæði eftir til dansibrúk, hava tær vituliga sett spor eftir í kvøðingini av kvæði okkara eisini á okkara døgum. Árinið av tekstbøtingum teirra kann millum annað síggjast av ljóðbandaupptøkum, ið eru at finna av kvæðinum í bandasavninum á Føroyamálsdeildini.

Innihaldið í Gongurólvskvæði hevur Svabo endurgivið soleiðis í einum stuttum samandrátti, sum hann hevur skrivað framman undan B-frábrigdi sínum:

> Ilgjeer Stajn og Odnabjødn, 2 Brødre i Norge, bygge et Skib, og sejle til Island, hvor Gongu-Rølvur kommer i deres Selskab. De sejle derfra og møde et overhaands Uvejr, og komme endelig til Lands, efterat Mandskabet var dødt, da Ilgjeer Stajn, Odnabjødn og Gongurølvur forlade Skibet, og ginge til Fods. Efter mange Dages Omvanken døe Ilgjeer og Odnabjødn, men Rolvur kommer til en stor Jettes Hule, ved Navn Rosmar, der var gift med hans Syster, hvor han bliver 6 Vintre. Siden befordrer Jetten ham til et got Land, hvorfra han blev førdt til Trundhjem, ved Skygv eav Stokkanesi, til Kong Ole, hvor han blev kristnet, men døde strax derpaa.[3]

Ein samanburður millum søguna í B-frábrigdinum og samandráttin av henni hjá

Svabo vísir, at Svabo hevur als ikki nevnt ástarviðurskiftini millum Rólv og systrina, ið er ein týðandi spurdómur í granskingini av kvæðinum. Í »Færöiske Kvæder« hevur Hammershaimb sum ein part av frágreiðing síni um kvæðið endurgivið innihaldið í A-frábrigdinum hjá Svabo ógvuliga gjølla og síðan gjørt vart við ymisk frávik frá tí í hinum frábrigdunum. Í staðin fyri ta drúgvu donsku frásøgnina hjá Hammershaimb skal eg her endurgeva hana í eitt sindur styttum líki, ið kortini skuldi givið eina nóg fullfíggjaða mynd av søgugongdini í kvæðinum til okkara endamál:

> Brøðurnir Illgerð-Steinur og Ódnarbjørn lata á Norðmýri í Noregi smíða eitt stórt skip, sum teir skulu fara til Grønlands við. Teir fáa Snorra Fót til stýrimann, men komnir til Íslands taka teir Gongurólv umborð til stýrimann. Á ferðini haðani til Grønlands koma teir í ódnarveður, sum ger, at skipið rekur norður í Trøllabotn, har ein risi, Rosmar, drepur alla manningina uttan Illgerð-Stein, Ódnarbjørn og Gongurólv. Teir laða gull í barmin á sær og fara til gongu frá skipinum inn í landið, sum er berir jøklar og ísakalt. Tá átta dagar eru gingnir, doyr Illgerð-Steinur av kulda, men Rólvur ber byrði hansara í aðrar átta dagar, tá ið Ódnarbjørn doyr somuleiðis av kulda. Rólvur tekur eisini hansara byrði upp á seg og gongur nú einsamallur í kølmyrkri í átjan dagar, til hann sær eld brenna í fjallinum, men áðrenn hann fer inn har, grevur hann alt gullið niður. Í hellinum hittir hann eina trøllvaksna kvinnu, sum roynist at vera systir hansara, ið verður nevnd bæði Hilda og Svanna í kvæðinum. Hon krógvar Rólv fyri Rosmari, sum annars verður at eta hann, tá ið hann kemur heim. Tá ið Rosmar kemur aftur í hellið, kennir hann royk av kristnum manni og krevur av Hildu at fáa hann straks at eta. Hilda sýtir fyrst, at nakar er komin har, og sigur, at ein kráka hevði slept niður gjøgnum ljóaran eitt mannabein, sum hon hevði kastað út aftur. Tá Rosmar ikki vil trúgva henni, tí hann saknar stýrimannin á skipinum, fær Hilda risan at lova ikki at gera manninum nakað, tí hann er bróðir hennara. Hetta lovar Rosmar, og Hilda tekur nú Rólv fram og setir hann á knæið á Rosmari, men tá ið hann klappar Rólvi, brýtur hann fleiri riv á honum, og Hilda skundar sær at taka Rólv frá honum aftur. Tá ið Rólvur hevur fingið at eta, fer hann út úr hellinum, og har sær hann skip sítt standa bundið, sum Rosmar og tveir brøður hansara hava drigið niðan á fjallið. Síðan hevði Rosmar dripið brøður sínar fyri at ráða øllum einsamallur. Sjeynda veturin, ið Rólvur var í hellinum, legði hann ást við systur sína, Svannu, og hon fær Rosmar at flyta Rólv heim aftur saman við einari kistu við gulli. – Í Cb-tekstinum hjá Jóannesi í Króki leggur Svanna seg í kistuna, sum Rosmar skal bera – Rosmar veður eftir botninum við Rólvi og kistuni, til teir koma til Moyggjaland og skiljast. Rólvur takkar Rosmari fyri hjálpina, biður hann heilsa Svannu, men at líta á heimleiðini upp í eystur fyri at síggja eina drotning. Tá ið Rosmar lítur í sólarmagn, verður hann til ein dranga mitt í Írlandshavi. Á Moyggjalandi svevur Rólvur hjá frúnni Lindinmjá, til hon triðju náttina missir moyggjarnavnið. Tá ið hinar moyggjarnar eisini vilja njóta Rólv, fær frúgvin Lindinmjá ein risafugl at flyta hann til Tróndheims í Noregi. Har møtir Rólvur aftur systur síni við ungum syni í fangi. – Í Cb-tekstininum verður sagt, at systirin var komin av einum skipsvraki til Tróndheims. Síðan fer Rólvur til Ólav kong, greiðir honum frá ferð síni, letur seg kristna og doyr.

Kvæði okkara er ikki bara kent úr Føroyum, men uppskriftir av tí eru gjørdar eisini í Danmørk, Svøríki og Noregi, og henda víða útbreiðsla hjá tí reisir fleiri áhugaverdar spurningar, eitt nú viðvíkjandi uppruna og aldri tess. Í Noregi er til bara eitt brot av kvæðinum, sum varð skrivað upp um miðja 19. øld í Telemark og bar navnið *Gonge-Rolv* ella *Rolv gangar*. Hetta brotið greiðir frá, at Rólvur liggur úti til havs á skipi eina jólanátt og fær ikki kynt eld. Hann leitar tí til eitt helli, har eldur brennur, og møtir einari risakelling, sum hann má flýggja fyri[4]). Aftur at hesum vistu summir heimildarmenn at siga, at ørindini hjá Rólvi við ferð síni vóru at leita eftir systrini. Tó at hesar upplýsingar kunnu takast sum eitt prógv um, at kvæðið hevur verið kent í Noregi, finna vit ikki tilburðin í brotinum

aftur í uppskriftunum av kvæðinum uttan fyri Noreg. Hinvegin er okkurt ørindi, sum upphavliga man hoyra til í kvæðinum, varðveitt í tí gitna norska halgikvæðinum »Draumkvede«, eitt nú hetta: Æg hæv vøri her uppeffe me skj / å neat på havsens bonnar / den som mine fotspor ska fygje / han lær kje a blie munnar[5]. Úr Svøríki er til bara ein uppskrift av kvæðinum, sum har eitur *Havsmannen*[6]. Hon varð gjørd í 1813 í Östergötland eftir einum heimildarfólki, sum hevði lært kvæðið (vísuna) í Skåne. Eftir innihaldi sínum samsvarar uppskriftin mest við vísuna, sum hon er kend úr Danmørk.

Serliga áhugaverdar fyri granskingina av kvæði okkara eru tríggjar uppskriftir av donsku kempuvísuni um *Rosmer*, gjørdar longu í 16. øld, og hartil tekstirnir av vísuni, sum vórðu prentaðir av Anders Sørensen Vedel í kempuvísubók hansara í 1591[7]. Harvið kom vísan í danska málbúna sínum at liva við síðuna av kvæði okkara í øldir í Føroyum og í Noregi. Henda støða má eisini havast í huga, tá metast skal um árin uttanífrá á kvæði okkara.

Við tað at innihaldið í teimum nevndu donsku frábrigdunum av Rosmer-vísuni er somikið ymiskt, skal eg geva ein samandrátt av evninum í hvørjum frábrigdi fyri seg. Tilgongdin í A-frábrigdinum er henda:

> Ein rík einkja í Danmørk nevnd Fru Hillelille hevur bygt eina fagra borg. Dóttir hennara, Jomfru Svannelille, verður stolin, og leitað verður eftir henni. Tríggir brøður hennara fara eisini at leita og sigla í 8 ár, til teir koma til eitt fjall, har teir finna systrina. Hon krógvar brøður sínar fyri risanum Rosmer, men tá ið hann kemur, kennir hann royk av kristnum manni. Hon sigur fyrst, at ein fuglur hevði kastað eitt mannabein inn, men hon hevði kastað tað út aftur, men at enda sigur hon, at systursonur hennara er komin og spyr, um hann ikki kann vera har. Rosmer biður hann koma inn og setir yngsta bróður hennara á knæið og klappar honum, so hann verður bæði gulur og bláur. Tá Jomfru Svannelille fer at leingjast heim aftur, fær hon Rosmer at bera yngsta bróðurin og eina gullkistu, sum hon sjálv krógvar seg í, umborð á skipið, sum førir øll systkinini heim aftur til móður teirra. Tá ið Rosmer kemur heim til sín og sær, at *Jomfru Svannelille er burtur*, doyr hann, t.e. »hand spranck y flinthe-stenne«.

B-frábrigdið er meira brotkent og tí torskilt viðvíkjandi tilgongdini:

> Íslands kongur hevur bygt eitt skip, sum Rosmer drepur alla manningina á uttan Alvar kongsson, ið kemur til eitt lítið hús, har hann fer inn. Fru Hillelille tekur væl ímóti honum og ávarar hann móti Rosmer, at hann fer at eta hann, tá ið hann kemur heim. Heimkomin krevur Rosmer mat, men Hillelille sigur, at ein fuglur kastaði eitt mannabein inn, og at hon hevði kastað tað út aftur. Síðan sigur hon við Rosmer, at ein smádrongur var komin frá hennara landi at vitja, og fær hann at lova ikki at gera honum nakað. Tá ið Alvar kongsson hevði verið 8 ár har, gjørdi hann Hillelille við barn. Frábrigdið endar við, at Hillelille sigur við Rosmer, at sveininum leingist heim aftur til land sítt. – Vedel hevur hetta uppískoyti í sínum vísuteksti: Rosmer gevur honum eina gullkistu, sum hon leggur seg í, og hann ber bæði gjøgnum sjógvin til landið, har sólin skínur. Sveinurin sigur her Rosmer frá, at »Helene« er við barn, og hann svarar, at hevði hann ikki svorið honum trygdareið, skuldi hann beint fyri honum. Rosmer skundar sær heim, men tá hann ikki finnur »Helene«, doyr hann, t.e. »flyver i Flint«.

C-frábrigdið greiðir soleiðis frá:

> Tveir menn, nevndir »Bucke Been« og »Ellfuer Steen«, lata byggja ein knørr, sum teir fara til Íslands við og kalla »Huiden Gaas«. Har fórst skipið av trøllaávum. Bara ungi Roland finnur á eina gøtu á havsins botni, sum gongur til búrið hjá Eline. Roland sær neistar í fjallinum og kemur ríðandi í garð, har Eline systir hansara tekur ímóti honum. Vátur og kaldur gongur hann inn í fjallið, og Eline biður hann verma síni frosin bein, men sigur við hann, at tá ið trøllið kemur heim, verður hann stoktur á teini. Rosmer sigur heimafturkom-

in, at kristin maður er inni har. Eline sigur fyrst, at ein kráka fleyg yvir húsið og feldi eitt mannabein, men tá Rosmer ikki trýr tí, sigur hon, at næsti frændi hennara er komin úr Íslandi, og hon fær Rosmer at svørja ikki at gera honum nakað. Tá ið tvey áru eru umliðin, ger Roland Eline við barn. Hon fer til Rosmer og biður hann flyta frænda hennara heim aftur. Sjálv fjalir hon seg í eini kistu við gulli og silvuri, sum Rosmer hevur givið Roland. Rosmer ber nú Roland undir hondini og kistuna á bakinum gjøgnum sjógvin til landið, har sól og máni skína. Roland takkar Rosmer, tá ið teir skiljast, og sigur, at Eline er við barn. Rosmer tárar og sigur, at hevði hann ikki svorið trygdareiðin, skuldi hann svølgt Roland. Hann skundar sær heim aftur, men tá ið hann ikki finnur Eline, springur hann av harmi og verður til stein. Meðan fylgjast Roland og Eline upp í landið, har hann má vísa henni vegin.

Um granskingina av donsku Rosmer-vísuni kann sigast, at fyrsta stigið byrjar á ein hátt við útgávuni av henni hjá Vedel, við tað at hann metti tær donsku uppskriftirnar ikki at umboða eina vísu, men tríggjar ymiskar vísur um Rosmer.

Vísindaliga granskingin av vísuni og kvæðinum byrjar ikki av álvara fyrr enn við Svend Grundtvig og drúgva inngangi hansara í »Danmarks gamle Folkeviser«[8]) til donsku vísuna um Rosmer. Høvuðsúrslitini av gransking hansara eru:

1. Tær elstu donsku uppskriftirnar úr 16. øld umboða ikki, sum Vedel helt, tríggjar ymiskar vísur um Rosmer, men somu vísu.
2. Okkara Gongurólvskvæði, sum eisini váttar hetta sambandið millum donsku uppskriftirnar, hevur serligan týdning fyri granskingina av vísuni, tí at okkara kvæði stendur á einum eldri stigi enn danska vísan, men kortini ikki á tí elsta stiginum.
3. Keldurnar, sum vísan ella kvæðið er yrkt eftir, eru ikki kendar. Soleiðis hava tey einki beinleiðis samband við ta ævintýrkendu, íslendsku fornsøguna um Gǫngu-Hrólf, tað er *Gǫngu-Hrólfs saga,* uttan tað at bæði siga, at navnið Gongu-Rólvur hevði hann fingið, tí eingin hestur kundi bera hann. Heldur ikki hevur tann danska vísan um Rosmer sama uppruna sum eitt skotskt ævintýr við leysaørindum í, sum skotin Robert Jamieson hevði hoyrt í sínum barndómi og runnu honum í huga, tá ið hann týddi donsku vísuna til enskt fyrst í 19. øld (prentað 1806). Innihaldið í hesum ævintýri er stutt sagt: *Burd Ellen* er burturtikin av álvum, og brøður hennara, tríggir í tali, fara at leita eftir henni, men tó at allir fáa sama ráð frá gandakallinum Merlin, er tað bara tann yngsti, *Child Rowland* og hetjan í ævintýrinum, sum finnur systrina, vinnur á álvakonginum og flytur hana heim aftur við sær. Av leysaørindunum, sum Jamieson tekur sum prógv um, at ævintýrið hevur upphavliga verið ein vísa av sama slagi sum Rosmer-vísan, kundi hann minnast serliga væl hetta ørindið, ið álvakongurin hevði á munni, tá hann kendi royk av Rowland: With fi, fi and fum! / I smell the blood of Christian man: / Be he dead, be he living, wi my brand / I'll clash his harns frae his harn-pan. Svend Grundtvig hevur týtt hetta leysaørindið sera leysliga soleiðis: Hann snøftet í Skjæg, hann vejret i Sky: / Jeg lugter en Kristenmands Blod: / hvad han er levende eller død, / hans Hjærne skal flyde for Fod[9]). Vert kann tað eisini vera at nevna, at sama ørindi gongur aftur hjá William Shakespeare í sjónleikinum »King Lear«, 3. akt, 4. scenu,

í broyttum líki: Child Rowland to the darke tower came. / His word was still, Fy, fo and fumme. / I smell the bloud of a British man[10]). Tó at Svend Grundtvig kundi síggja stóran líkskap millum tað skotska ævintýrið og serliga A-frábrigdið av donsku vísuni viðvíkjandi søguevninum og nøvnunum á høvuðspersónunum, eitt nú: Rowland, Hille og Ellen, gjørdi hann, vart við, at nevnda leysaørindi kemur fyri í fleiri ævintýrum og kann tí ikki takast sum prógv um beinleiðis skyldskap millum ævintýrið og donsku vísuna.

4. Vísan um Rosmer hevur sostatt ikki skotskan (ella skotsk-keltiskan), men norðurlendskan uppruna. Søgan í hinum frábrigdunum av donsku vísuni speglar sum í føroyska kvæðinum aftur tveir ymiskar sagnformar, sum eru komnir í bland. Annar teirra er (a) ein frásøgn um eina gentu, sum er burturtikin av einum trølli, men verður bjargað av bróður sínum, hin er (b) ein frásøgn um ein kappa, sum kemur til ein risa, ið eigur eina dóttur, ið kappin ger við barn. Av hesum báðum sagnformunum er tann seinni tann eldri. Donsku B- og C-frábrigdini standa millum danska A-frábrigdið, ið hevur fingið tann yngra sagnformin, og føroyska kvæðið, ið er merkt av blandinum av báðum sagnformunum.
5. Eftir áskoðanini hjá Svend Grundtvig eru danska vísan og føroyska kvæðið upphavliga komin úr Noregi, tó at har er bara varðveitt eitt lítið brot av kvæðinum. Prógvini fyri, at danska vísan er norsk, eru fyrst og fremst málslig. Navnið *Rosmer* á risanum er tað sama sum norskt *rossmål* (*rossmår*), ið merkir 'roysningur' (sbr. annars norr. *rosmhvalr* m. og *rostungr* m.) Navnið »hviden Gaas« á skipinum er »afledt af et norsk Digterudtryk for et skib i Almindelighed«. Navnið kemur annars ikki fyri í tí norska kvæðabrotinum, men í okkara kvæði (sbr. »hvíta gás« ella »hvítar gæs«). Tá Rosmer grætur í teirri donsku vísuni, verður sagt um tár hansara, at tey renna »som Duggen driver for Elve«, og má tað vera ein misskiljing av vendingini í okkara kvæði »so runnu tár av risans kinn / sum høgl av hvøssum æli« (A 87) ella »So støkk tár av risans kinn / sum høgl av stórum æli« (B 76). Orðið »Krosser« í danska frábrigdinum (ør. 7) hevur helst ongantíð verið danskt, sigur Grundtvig, men er »krásir« í okkara kvæði og er gott gamalt norskt. Niðurlagið í danska B-frábrigdinum, tað er: »i Havet ud der sejle de Nordmænd«, tekur Grundtvig eisini sum eitt prógv aftur at hinum um norskan uppruna. Tó at tað danska A-frábrigdið stendur fyri seg sjálvt í mun til hinar norðurlendsku uppskriftirnar viðvíkjandi søguni, vísir kortini navnið *Svane* í tí danska frábrigdinum á teirri burturtiknu gentuni móti tí norrøna kvinnuheitinum *svanni*, ið eins og *Svanna* í føroyska kvæðinum er vorðið misskilt sum eitt serligt kvinnunavn. Hinvegin er navnið *Hilda* í okkara kvæði í tí danska A-frábrigdinum vorðið knýtt í forminum *Hillelille* at mammuni at teirri burturtiknu gentuni. Í danska B- og C-frábrigdinum er seinna navnið knýtt at risadóttrini (soleiðis B) ella at gentuni, ið leitað verður eftir (C, sbr. Eline).
6. Svend Grundtvig sigur annars um

gransking sína av Rosmer-vísuni, at hann hevur givið evninum í henni serliga gætur, tí hon tykist at vera eitt sjáldsamt dømi um, at ein vísa, ið er kend um næstan øll Norðurlond og fyrst uppskrivað í Danmørk, er komin upphavliga úr Noregi til Danmarkar og ikki hin vegin. – Fyri okkum føroyingar er tað serliga áhugavert, at Svend Grundtvig roynir at føra prógv fyri upphavsáskoðan síni ikki við norskum, men fyrst og fremst við tilfari úr føroyskum uppskriftum av kvæðinum. Eitt er í hvussu er víst, at úrslitið av gransking hansara av Rosmer-vísuni fekk seinni stórar avleiðingar fyri upphavsspurningin viðvíkjandi kappakvæðayrking í Norðurlondum og ikki minst viðvíkjandi norsk-føroyska sambandinum her.

Í 1937 skrivaði norski fólkavísugranskarin Knut Liestøl eina grein[11]), har hann roynir at greina nærri spurningin um tann upphavliga sagnformin, sum kvæðið/vísan um Gongu-Rólv byggir á, og her at vísa á skyldskapin millum henda sagnform og norrønar fornsøgur, tað eru serliga fornaldarsøgur. Sigast skal beinanvegin, at Liestøl sum Grundtvig heldur, at kvæðið er upphavliga norskt, at allar uppskriftirnar av norðurlendskum vísum um Rosmer umboða eina kvæðatýpu, og at ein eldri og ein yngri sagnformur eru komnir í bland í uppskriftunum. Tann eldri sagnformurin er, sum ikki bara Svend Grundtvig men eisini Axel Olrik helt, ein frásøgn um ein kappa, sum kemur í eitt risahelli og leggur har ástir saman við eina risadóttur, sum hann barnar. Eisini metir Liestøl, at okkara kvæði, tó at tað er uppskrivað »200-300« ár seinni enn tær elstu donsku uppskriftirnar av vísuni, er upphavligari viðvíkjandi søguni enn tær. Hinvegin sigur hann um kvæði okkara: »Den færøyske formi, som er den lengste, er full av motsegjingar og usamanhangande drag« (s. 187). Sum dømi um slíkar tvørsagnir í kvæðinum nevnir Liestøl: »Kvinna i berget er skildra som ei jøtunkvinne: ho er stor, og so sterk at ho lyfter Rolv som eit barn, men like vel er ho syster hans. Rolv bed risen helsa »urðar svannu«, som er ei kenning for eit jøtunkvende (av same slaget som »hellis sprund« og »hamra víf«). Heilt uventa møter me henne att i Noreg med ein son, utan at me fær de minste greide på korleis ho er kome dit, og so kverv ho or visa att med ein gong« (s. 187). Tó at tann eldsti teksturin av donsku vísuni, t.e. Afrábrigdið, er mest heildarkendur viðvíkjandi søgu síni, tað er: »ein genta, sum er burturtikin av einum trølli, verður bjargað heim aftur av yngsta bróður sínum«, sær Liestøl hana sum yngsta stig burtur frá tí upphavliga stakdáminum móti tí meira almenna og formilbundna. Ævintýrdrøg treingja seg inn í trøllakvæði, sum upphavliga hava fingið evni sítt úr fornaldarsøgum, annaðhvørt beinleiðis ella óbeinleiðis. Við tað at Liestøl hevur við doktararitgerð síni[12]) havt høvi at granska henda spurdóm nærri í sambandi við eitt nógv størri tilfar, skuldi hann eyðvitað havt serligar fortreytir at meta um hann eisini í hesum føri. Sum eina byrjan at kanning sínari av kvæðinum tekur hann fyri seg at draga fram eyðkend ævintýrdrøg, sum kvæði okkara hevur felags við nøkur norsk undurævintýr. Sum dømi um hetta nevnir hann:

(1) Genta er horvin, og bróðir hennara

leitar eftir henni – drag kent úr ævintýrinum »Svarteliten«.

(2) Burturtikin moyggj krógvar hetjuna fyri trøllinum, og tá ið tað kemur heim og kennir royk av kristnum manni, sigur hon, at ein fuglur hevði slept einum mannabeini niður gjøgnum ljóaran – drag kent úr ævintýrinum »Risen som ikke hadde noe hjerte på seg«.

(3) Trøllið ber burturtiknu gentuna uttan at vita um tað heim aftur, og tað verður til stein, tá ið sólin rísur – drag kent úr ævintýrinum »Hønen tripper i berget«.

Tekur ein nú burtur tey nevndu ævintýrdrøgini úr kvæðinum, fær ein eina frásøgn um eina ferð til Grønlands, har skipið endar norðuri í Trøllabotni. Bara ein maður verður bjargaður og kemur í eitt helli. Har hittir hann eina kvinnu av risakyni og verður verandi leingi í hellinum, til hann leggur ástir saman við hana og ger hana við barn. Tá ið hann fer av stað úr hellinum, fylgir risin honum á leið, og seinni kemur kvinnan til hansara við syni teirra. Spurningurin er so, um kvæðaskaldið hevur tikið søguevnið úr egnum brósti, ella um hann, sum dømi eru um við fleiri trøllakvæðum, hevur havt norrønar bókmentakeldur at byggja á.

Liestøl nevnir tríggjar fornaldarsøgur, sum greiða frá kærleika millum ein kappa og eina jøtunsdóttur, ið verður við barn, men kemur seinni við barninum til kappan í mannaheim. Sum slík dømi nevnir hann »Kjalnesinga søgu«, eina yngri gerð av »Ørvarodds søgu« og serliga »Ketils søgu hængs«, ið hann metir at hava størstan týdning fyri granskingina av keldunum at kvæði okkara. Í »Ketils søgu hængs[13])« verður sagt, at Ketil á eini fiskiferð seint um heystið rekur í illveðri til havs og vinnur ikki upp land aftur fyrr enn í Finnmørk. Har leggur hann at landi og sovnar, men vaknar brádliga, tá ið ein gívur tekur um stavnarnar á báti hansara og ristir hann. Ketil má taka til rýmingar við báti sínum, og illveðrið stendur við, men nú kemur ein hvalur, sum lívir bátinum, og sum Ketil helt hava mannaeygu. Báturin ferst at enda á nøkrum skerjum, men Ketil bjargar sær í land og kemur til ein garð, har ein maður, t.e. ein jøtun, stóð úti og høgdi við. Hann æt Brúni, og teir fara inn. Har vóru tvær kvinnur, og Brúni letur Ketil sova hjá dóttrini Ravnhild. Hann breiddi nakrar neytahúðir yvir tey, fyri at nakrir jatnir, sum komu har, ikki skuldu síggja tey. Hesir jatnirnir fingu nakrar smørleypar, sum Ketil hevði fingið við sær, tá ið hann rýmdi undan gívrini. Ketil varð verandi har um veturin, men eftir jól tók hann at langta heim. Hann fór tí av stað, men á vegnum hitti hann Gusa Finnakong og drap hann. Tá vendi hann aftur til Brúna og greiddi frá tí, sum hent var. Brúni segði, at Ketil hevði høgt sær nær, tí Gusi var bróðir hansara, men Ketil svaraði, at nú kundi Brúni verða kongur eftir Gusa. Brúni fylgdi so Ketli til heimbygd hansara, og teir skiltust sum góðir vinir. Trý ár seinni kom Ravnhild til Ketil og hevði son teirra við sær, men faðir Ketils var ímóti, at hann skuldi gifta seg við jøtunsdóttrini, og hon fór tí sorgarbundin heim aftur.

Um sambandið millum Ketils søgu og kvæðið sigur Liestøl: Í báðum er tað talan um eina sjóferð, har skipið í illveðri rekur norður í trøllaheim. Í báðum kemur hetjan til ein risa, og í báðum fær hetjan ein son við eini kvinnu, sum er hjá risanum. Í báðum fylgir risin hetjuni á heimveg hans-

ara og skilst frá honum í vinskapi. Síðan kemur kvinnan til hetjuna og hevur son teirra við, men so hvørvur hon aftur úr søguni. Aftur at hesum nevnir Liestøl fleiri serdrøg millum søguna og kvæðið. Báði í søguni og í kvæðinum er tað talan um, at risin hevur brøður, sum verða dripnir. Eisini samsvarar norska kvæðisbrotið merkiliga við Ketils søgu, har Ketil leggur at landi og má rýma undan gívrini aftur. Bæði í søguni og í kvæðinum verður hetjan krógvað undir skinnum. Í kvæðinum er tað Hilda, sum ger tað, men í søguni er tað Brúni. Bæði í søguni og í kvæðinum verða matvørur nevndar, sum hetjan hevði á skipinum, men vóru komnar í risagarðin, uttan at tað verður sagt hvussu. Liestøl er hugaður at halda, at risanavnið Rosmar í kvæðinum kann vera ein nýgerð eftir tilburðinum við hvalinum í Ketils søgu, har hvalurin má vera ein umskaptur jøtun. Í tí føroyska kvæðinum sær ein, at Rosmar er hugsaður sum ein havjøtun (havrisi), tí hann ferðast 18 dagar við Rólvi gjøgnum sjógvin. Her vísir Liestøl eisini til sjónarmiðið hjá Svend Grundtvig, at bjálvin, sum Rosmar brúkar í sjónum, man vera ein hamur. Í norrønum skaldskapi eru t.d. »hvalir« og »selir« jøtunheiti, sum man sipa til umskapingarevnini hjá jøtnum. Navnið *Hilda* í kvæðinum líkist nøvnum á jøtunkvinnum í fornaldarsøgum, eitt nú *Hrafnhildr* í Ketils søgu og *Hildigunnr* í Ørvarodds søgu.

Knut Liestøl er vísur í, at tað er eitt slag av sambandi millum Gongurólvskvæði og Ketils søgu, men tað er hin vegin ikki greitt, um tað er talan um beinleiðis samband, soleiðis at kvæðaskaldið hevur júst havt Ketils søgu í huga sínum. Fornaldarsøgurnar vísa ið hvussu er, hvussu lætt ávís motiv ella ávís motivrøð kunnu lænast í nýgerðum av fornaldarsøgum í seinnu helvt av miðøldini. Vit mugu tí rokna við sum einum møguleika, at tað kann vera ein slíkur, nú ókendur, millumliður millum Ketils søgu og kvæðið.

Við hesum baksýni er tað eftir Liestøl lættari at skilja tey ymisku løgini í vøkstrinum av kvæðaevninum, og sum hann sjálvur sigur síðan: »motsegjingane og det usamanhangandi fær si forklåring. Kvinna i berget er skildra so stor og sterk av di ho er dotter til risen. No skynar ein kvifor Hilda i dei fleste færøyske variantane vert att i bjerget, og kvifor ho seinare so uventa kjem til heimlandet åt helten og hev ein son med, og so atter kverv burt; det er minne um at Ravnhild vert att i Risaland, fekk ein son der, kom seinare til Ketil med han, men drog so burt att. Når visa hev det dragget som er einestående i trollvisone, at risen fylgjer helten på heimveg, so hev det utgangspunktet sitt i det Ketils saga fortel um at Brune fylgde Ketil heim tilbygdar«.

Við tað at so nógv ævintýrdrøg eru komin inn í kvæðið so við og við, mátti tað virka aftur á tað upphavliga evnið í tí, soleiðis at gamalt mátti skjótast út fyri at geva rúm fyri nýggjum. Hvussu langt henda broytingargongd var komin, sæst longu av teirri elstu donsku uppskriftini (A) frá 16. øld, har fornaldarsøgudámurin hevur vikið heilt fyri ævintýrdáminum. Tó at tær føroysku uppskriftirnar av kvæðinum eru yvirhøvur meira enn 200 ár yngri, hava tær hildið fastari upp á fornaldarsøgudámin, eisini soleiðis at hendingarnar í okkara kvæði eru bundnar meira at landafrøðiliga kendum plássum, eitt nú: Noregi, Norðmøri (Norðmýri), Tróndheimi, Íslandi, Grønlandi og

Írlandi, og at sannsøguligum persónum sum Ólavi kongi og Snorra Fót. Hesin *Snorri fótr* er nevndur í íslendskum annálum sum burturgingin í 1343[14]. Eisini má havast í huga tað, sum fólk í miðøld hava trúð uppá, eitt nú at Trøllabotnur var eitt land onkustaðna millum Grønlands og Noregs. Kortini umboða tær føroysku uppskriftirnar ikki tað elsta stigið hjá kvæðinum, heldur Liestøl eins og Grundtvig, og harvið er Gongurólvskvæði ongastaðna varðveitt viðvíkjandi søguevni sínum í sínum frumlíki. Liestøl tekur soleiðis samanum, tá ið hann skal lýsa kvæði okkara í verandi líki: »visa handsamar eit eventyrleg emne på same gjerd som ei fornaldarsoge. Hon gjev det historiske og geografiske tilknytningar, so det fær noko visst realistist yver seg, samstundes som ein merkar ein tilhug til å fabulera, til å dikta inn nyt tilfang, so det heile vert meir episoderikt og laust i komposisjonen. Gleda ved det rike tilfanget er so stor at gamalt og nytt lever fredeleg side om side i hundradvis av år, jamvel om det ikkje høver sers vel i hop«.

Tó at granskingin hjá Liestøl av Gongurólvskvæði hevur givið djúpari innlit enn tann hjá Svend Grundtvig í sambandið millum kvæðið og aðrar skaldskapargreinir, og tað er bæði í mun til norrønar bókmentir sum fornaldarsøgur og í mun til skaldskap av manna munni sum ævintýr, ivist eg kortini í, at sjónarmið hansara eru altíð á beinari leið. Eg meti millum annað, at hann ger ov nógv av líkskapinum millum Ketils søgu hængs sum fyrimynd – beinleiðis ella óbeinleiðis – hjá kvæðaskaldinum, sum yrkt hevur Gongurólvskvæði. Viðvíkjandi tilburðinum í tí norska kvæðisbrotinum, har hetjan má rýma úr hellinum undan gívrini, haldi eg hann ikki vera upphavligan í norska kvæðinum, tí hann stendur heilt uttan fyri uppskriftirnar av tí aðrastaðna, men heldur at vera eitt yngri lán úr einum øðrum norskum trøllakvæði og kanska »Kappen Illugjen«[15]) ella at vera uppíyrking. Tó at tað tykist greitt av muninum á frábrigdunum av teirri donsku vísuni, at flutningurin á manna munni hevur borið við sær, at okkurt frábrigdi (A) hevur nærkast sera nógv einum ævintýri, ivist eg kortini í, um tað eisini er beint at síggja ævintýrdrøgini í okkara kvæði, har uppskriftirnar annars fylgja hvør aðrari, sum úrslit fyrst og fremst av lívinum hjá kvæðinum á manna munni í staðin fyri at seta tey í samband við kelduna, sum kvæðið er yrkt eftir. Henda kelda, annaðhvørt hon hevur verið skrivlig ella munnlig, hevur sameint bæði norrønt og keltiskt frásøgutilfar, tí hvaðan skal tilburðurin á Moyggjalandi, sum er eitt keltiskt motiv[16]) annars vera komin inn í kvæðið? Eg kann tí heldur ikki góðtaka uttan víðari sjónarmið hjá Grundtvig og Liestøl, at kvæðið má vera yrkt heima í Noregi, tó at eg eri samdur í, at danska Rosmer-vísan má helst vera komin úr Noregi til Danmarkar. Fyri mín part haldi eg tað vera meira líkt, at kvæðið er yrkt, har møtið millum norrøna og keltiska mentan hevði betri fortreytir, og har kappakvæðayrking (í balladuformi) var ein virkin skaldskapararvur í seinmiðøld. Hetta vil aftur siga, at kvæðið man helst vera yrkt í Noregsveldi vestan hav, og tá ið ein telur Ísland frá, sum einki kennir til kvæðið uttan í týðingum av vísunum hjá Vedel til íslendskt og heldur ikki nakað til søguna, ið tað er yrkt eftir, eru tað eg skilji bara tvey oyggjalond eftir, og tað eru Føroyar ella Hetland, har vit hava eitt dømi

um kappakvæðayrking í norn varðveitt: *Hildinakvæði*[17]). *Av innihaldinum í kvæði* okkara síggja vit, at tað kann valla vera yrkt burtur frá sjónum inni í landinum í Noregi, har seinasta brotið av tí varð uppskrivað.

Viðvíkjandi aldrinum á kvæði okkara hava vit einki fast um at halda enn, at tær elstu uppskriftirnar av tí, t.e. tær donsku, eru gjørdar í seinnu helvt av 16. øld, men við tað at munurin millum tær longu tá var so stórur, at Vedel gav tær út í 1591 sum tríggjar ymiskar vísur um Rosmer, bendir hetta á, at kvæðið hevur livað heldur leingi á manna munni tá. Tað kann tí av nevndum grundum illa vera yngri enn seinni helmingur av 15. øld. Um stýrimaðurin Snorri Fót í kvæðinum er íslendingurin sum doyði í 1343, og hann er upphavligur í kvæðinum, skuldi aldurin á kvæðinum kunnað rokkið aftur til seinnu helvt av 14. øld. Útbreiðslan av kvæði okkara bendir á, at sambandið millum Føroyar og Noreg hevur verið livandi, tá ið tað var yrkt. Málið í Gongu-rólvskvæði er mergjað og fornt kappakvæðamál, har tað koma fyri bæði skaldslig heiti og kenningar, sum Grundtvig og Liestøl longu hava nevnt dømi um. Eg ditti mær kortini at nevna eina kenning afturat, sum kemur fyri í ør. 70 í B-frábrigdinum av kvæði okkara: Tríati nætur við grunnið veður, / glymur á *hamra høll,* / til hann kom á land so gott / sum sólin roðar í fjøll. – Eftir sambandinum er *hamra høll* helst ein kenning fyri hav, har fyrra orðið er hvørsfall í fleirtali av *hamar* í merkingini 'hemari'. Málsliga sæð hoyrir tí kvæðið til tann eldra ella elsta partin av kappakvæðayrkingum okkara, ið ætlandi er yrktur í 14. øld.

Um keldu sína sigur kvæðið sjálvt: Ingibjørg hevur os *fróðskap* kent / at ríma um reystar dreingir ... (A 1), men eyðvitað er ikki greitt, hvør henda Ingibjørg hevur verið, ella í hvørjum líki *fróðskapur* hennara hevur verið. Hann tykist at hava verið ein ævintýrkend fornaldarsøga ella eitt fornaldarsøgukent ævintýr, sum hon annaðhvørt hevur sagt frá (A 2: *frosnir* er helst **frásagnir*) ella hevur lisið upp (sbr. B 8: stendur í *skræmu langa* (...), har *skræma* eftir Svabo er »stor Bog, Skindbog«). Tað vit kenna til frásøgu av ævintýrum her á landi er úr nýggjari tíð, har heimildarfólkini eftir upplýsingum í FFÆ oftast hava verið konufólk. – Áhugavert kann tað eisini vera at nevna, at orðið *fróðskapur,* sum bara finst í kvæði okkara og er ikki funnið í fornmálinum, er vorðið støði undir nýføroyskari orðagerð sum *fróðskaparfelag, fróðskaparrit* og *fróðskaparsetur.*

Ikki bara úr tekstsjónarmiði, men eisini úr samtekstsjónarmiði er kvæði okkara sera áhugavert. Hvussu livandi og viðkomandi tað ella evni tess hevur verið fyri fólki her á landi, skal eg nevna trý dømi um, har tað fyrsta er upphavssøgnin *Sokkur Svannu*, ið ljóðar soleiðis:

> Frá sistur Gongu-Rólvs, Svannu, er sagt, at annar sokkur hennara kom rikin ettir sjónun inn á Sandoyri, tætt norðanfiri bigdina í Kvannasundi í Viðoy. Um henda sokk er eitt gamalt ørindi:
>
> Sokkur Svannu
> var alin og átjan spannir.
>
> Hann var av reyðun skarlaki og varð tí gjørdur til messuakul í Norðuroyakirkju. Hetta var firsti akul, til Norðuroyggjarnar kom[18]).

Nú kann hvør, sum vil, av sokkalongdini meta um fullu støddina á Svannu, men eitt er víst, at hon – at meta eftir upphavssøgnini – hevur verið hildin at vera eitt trøll-

vaksið konufólk, og samsvarar hetta eisini við ta mynd, vit fáa av henni (ella Hildu) í kvæðinum.

Tað næsta dømið er eisini ein upphavssøgn, sum vit skulu hoyra. Tá ið Gongurólvur hevði verið sjey ár í hellinum hjá Rosmari, kemur hann við risans hjálp, sum Svabo tekur til í danska kvæðasamandrátti sínum, til »et got Land«. Hetta er Moyggjaland, har allar moyggjarnar vilja tøla Rólv við ástum sínum. Eftir eini søgn, sum Jóannes bóndi nevnir í »Gyltubók«[19], men sum eg annars ikki kenni heimildina til, er Moyggjaland Suðuroy í Føroyum, har skuldi í forðum einki mannkyn vera á uttan konufólk. Við tað at tilburðurin á Moyggjalandi ikki er eitt norrønt, men keltiskt motiv, og Rosmar á heimferð síni úr Moyggjalandi verður til ein dranga mitt í Írlandshavi, man Moyggjaland eftir landafrøðiliga sjónarringinum í kvæðinum hava ligið nærhendis Írlandi, og tí er tað møguligt, at okkara Suðuroyggj í nevndu upphavssøgn sipar upphavliga til Suðuroyggjar (Hebridurnar), t.e. norr. *Suðreyjar*.

So ósamanhangandi, sum bæði Svend Grundtvig og Knut Liestøl hildu søguna í kvæði okkara vera í støðum, serliga viðvíkjandi ástarviðurskiftunum millum Rólv og kvinnuna (Hildu/Svannu) í risahellinum, ivast hvørgin granskari í, at okkara kvæði í sínum varðveitta líki umboðar, sagt við orðum Grundtvigs, »den ypperste Overleveringsform«[20]). Svend Grundtvig rósar eisini kvæðinum fyri »dets paa mange Steder mesterlige Skildring af Havets og Landets Farer i det høje Norden«. At kvæðið av føroyingum hevur verið mett ikki bara sum innantómt fornaldarreyp og sakleys skemtan, men hevur tvørturímóti við hvørt kenst nær lívsveruleikanum júst gjøgnum lýsingarnar av vandaferðum Gongurólvs á sjógv og á landi, hava vit eitt frálíkt dømi um í sambandi við eina hending í 1895, sum ein av monnunum, ið var við í ferðini, sjálvur hevur greitt frá. Her hugsi eg um greinina »Ein prestaflutningur« hjá Niels Petur Thomsen í Hvalba, ið stóð í »Tingakrossi« í 1927, men sum eg fari at endurgeva eitt brot av eftir »Oyggjatíðindum« fyri 11. januar 1984. Áðrenn eg lesi brot av greinini, skal eg upplýsa, at tað var við hesi hending í huga, at eg nevndi fyrilestur mín »Eg havi verið við havsins botn og stundum uppi við ský«.

Ein prestaflutningur

Háttvirdi blaðstjóri! Gev mær innivist í »Krossi« fyri at mótmæla tí, sum presturin Jørgen Falk Rønne hevur skrivað í »Dimmalætting« tann 5. mars um ein flutning millum Suðuroynna og Sandoynna.

Hvat viðvíkur tí fyrra helminginum av grein hansara, tá er hon sera væl skrivað, og annað kann heldur ikki væntast av einum manni við hansara lærdómi, og sum so ofta hevur roynt seg sum »forfattari«, men eg kann ikki fylgja honum longur enn til, tá ódnin brast á, tí tá gongur greinin uttan fyri sannleikan, og tað má eg átala, tí eg var við í ferðini, um Rønne hevur gloymt meg enn sum áður.

Tá vit vóru komnir okkurt um tveir fjórðingar úr Sandoynni, brast hann á við ódn av landnyrðingi og kolsvart í kavaroki, so valla sást fram um stavn, og skjótt fingu vit at síggja, at einki gekk fram. Tað var tí ikki annað til ráð at taka uttan at halda undan; men av tí at veðrið brast so knappliga á og sá út til at taka meira og meira til, hildu vit, at tað vóru óráð at halda á Suðuroynna, tá tað kundu vera vónir um at bjargast á Stóru Dímun, sum var okkum nærmast. Hetta vóru vit allir sameintir um, og hildu vit tí undan suður um oynna fyri at fáa skjól.

Komnir á Rættartanga var ikki hugsandi um at sleppa suður um fyri brotum, men haldast mátti á, og fingu vit har fjórða brotið av einum sjógvi, sum fylti bátin so tað fleyt úr og í. Komnir suður um, slætnaði tó so mikið, at vit fingu tømt bátin aftur,

men tá galt um at oysa, hvør sum sterkastur var, og *eingin spardi seg, tí lívið var eittans at bjarga.*

Prestur vil lata tað síggja út, sum at hann vísti okkum á oynna og spurdi formannin, um vit ikki skuldu royna at bjarga okkum á land, men har fer hann skeivur. Tí væl vistu bæði formaðurin og vit aðrir, sum við vóru, hvar Stóra Dímun lá, og hvussu vit skuldu fáa fatur á henni, um Harrin unti okkum lívið so leingi. Tí lítið hevði tað bøtt okkum, um presturin ráddi fyri ferðini.

Um skýming vóru vit suðuri fyri lendingini, men slopnir frá vandanum eystan fyri oynna sá tað út nú, sum vit ikki skuldu sleppa á land, tí brimið var ov nógv til, at vit kundu hava vónir um at bjargast í Drangjastøð, sum er heldur vánalig lendistøð, um veðrið er nóg so gott. Men her var einki við at gera uttan at halda á, um tað so bleiv til lív ella deyða. Og tað eydnaðist – allir 12 komu á turt at standa.

Tað fyrsta, vit gjørdu, var, at ein maður var sendur við presti at fáa hann til hús sum skjótast, tí illa var hann komin fyri, sum ikki var undur í, av at sita stillur í tílíkum ódnarveðri.

Tá ein stutt tíð var umliðin, kemur maðurin aftur við teimum tíðindum, at tað var heilt ómøguligt at koma upp, og prestur sat við uppgongdina.

Har vóru so fýra menn eftir til at skorða bátin og seta hann so, at einki skuldi vera at ivast í, at hann skuldi verða standandi. Av hesum fýra var eg ein; hinir eru allir deyðir nú.

Tá vit vóru lidnir við bátin, fóru vit til gongu, og vóru komnir upp á oynna, men tá vit komu til uppgongdina, sótu allir 8 har, og eingin sá seg føran fyri at fara longur.

Eg spurdi tí, hví teir sótu har, og fekk til aftursvar, at ikki slapst longur, við øðrum orðum, at har skuldu vit allir 12 seta okkum niður at doyggja. Eg helt, at so skuldi ikki verða; eg skuldi royna, um upp kundi gangast, tí deyðin var vissur hjá okkum við at sita har alla náttina, vátir inn at skinni í tí gellifrosti, tá var betur, ein ella tveir lótu lív fyri at royna uppgongd og bjarga øllum. Eg beyð mær tí til hesa vandafullu uppgongd, ikki tí at eg helt meg vera mætari maður enn hinir, men eg helt meg síggja, at mótloysi var fallið á allar av tí, at teir vóru steðgaðir, og kuldi, væta og svongd føra ikki dirvi við sær. Tað skar meg í hjartað at hugsa um, at allir hesir mensku menn, sum fúsir og órøddir fóru til øll verk, her skuldu sita og frysta í hel. Tí mátti roynast at sleppa upp á oynna og fáa hjálp har. Um tað so skuldi vera bani mín, so kundi tað vera tað saman, antin eg doyði nakrar tímar undan hinum.

Eg vildi tó hava ein við mær og fekk hann umsíðir. *Vit tóku eitt bátstog við okkum, og so var* hildið á.

Tað er at siga um kleivina í Dímun, at hon í góðum veðri og dagslýsi ikki er vandafull at ganga, og mong spor havi eg, eins og aðrir bjargamenn gingið, sum vóru mangar ferðir verri, men hesa nátt í myrkri, kavaroki, ódnarstormi og alt glerstoytt, sá tað illfýsiligt út, og lítil hugsan var um at koma fram.

*Stormurin var so óførur, at tað var bara eftir løg*um at koma eitt sindur úr stað, og væntandi var hvørja løtu, at tann ójavni kastivindurin fór at taka meg av fótum út fyri og í sorl. Har afturat var alt, sum gangast skuldi á, tann beri ísur, og av tí at eg einki annað hevði enn slíðraknív at høgga spor í ísin fyri hond og fót, gekk tað heldur spakuliga.

Tann maðurin, sum við var, helt mær í bátstogið so langt, sum tað rakk, og tá eg hevði høgt so frægt, at eg helt, vit kundu sita, so dró eg hann til mín, og so var farið aftur at royna at koma longur.

At hesin maður, sum við mær var, ikki gjørdi mun til at eg kom upp, veit eg best sjálvur, tí um hvirlurnar slógu meg út fyri, visti eg fullvæl, at hann ómøguliga kundi halda mær aftur, og um hann gav seg til tess, so fylgdi hann aftaná. Hetta hugsi eg, at hvør bjargamaður dugir at skilja.

Komin tætt upp undir tromina dunaði tað sum toran omanfyri, og hugsaði eg sum so: Komin so langt og ikki sleppa uppum, tað var syrgiligt! Eg væntaði, at her fór eg at verða sligin bakleiðis út fyri aftur, men hetta var ikki soleiðis ætlað av honum, sum øllum stýrir; tí eg slapp uppum, men *hvussu,* tað veit eg einki frá at siga. Tó tað veit eg, at hvørki mastur ella kleppjarn til amboð, ei heldur var nakar til at lyfta meg upp um tromina uttan hansara sterka hond, sum vildi bjarga okkum við mínari lítlu hjálp.

Presturin sigur frá, at tað vóru tríggir um uppgongdina, og at teir tveir settu mastrina í beltið hjá tí triðja og lyftu hann upp um tromina; hetta man hann antin hava fantaserað ella droymt um, ella vil hann siga eina ósannheit við fríum vilja, og tað er skomm fyri hann sjálvan.

Tá vit komu til húsar, var stongt og allar lúkur í topp fyri vindeygum, og var tí einki at gera uttan at ripa nevan á eina lúku, har ljós var innanfyri. Skjótur var bóndin og hansara menn at lata upp og fregnast um, hvat hetta var fyri larmur so seint á kvøldi.

Eg greiddi stutt frá, hvussu statt var, og bað bóndan sum skjótast fáa bjargalínu til at strekkja

oman ígjøgnum kleivina fyri at bjarga hinum. So var gjørt; bóndin og menn hansara vóru kvikir við línuni, sum so varð borin oman á eggina. Har varð bóndin bundin í og seig niður til teir 10 menninar.

Fyrstur, ið upp kom, var bóndin og prestur, síðan kom hvør aftan á annan eftir línuni, sum strekt lá eftir gøtuni.

Ikki skal annað sigast, enn at bóndin og hansara fólk vóru blíð, og ikki treyt matur og drekka. Men kuldin var í kroppinum á teim flestu, og tí helt eg best vera, at vit slógu ein ring á roykstovugólvinum; eg kann minnast, at eg kvað Gongurólvskvæðið, sum eg helt hóska væl til hesa ferð. Tá kvæðið var úti, varð farið til songar; men presturin hvarv, straks hann var inn komin, og sást ikki aftur um kvøldið.

Brot úr Gongurólvs kvæði (CCF 29, A)

Sjóferðin:

16 Hildu undan Íslandi
úr tí havnarlagi,
tóku inn unga Gongurólv,
hann kemur nú fyrst í kvæðið.

17 Tá var veður á sjónum hart,
Rólvur setst við stýrið,
vundu segl í húnar hátt,
og fram gekk knørrurin dýri.

18 Tá var veður á sjónum hart,
sveinar halda í hand,
Ísland er sum fuglur at sjá,
aldan fjalir land.

19 Vindur kom av rustum niður,
tað brakar í súðum hátt,
seggur seg við grunnið veður
bæði dag og nátt.

20 Báran brýtur, Ísland trýtur,
hurrar í hvørjum streingi,
aldan breyt í bæði borð,
alvæl dugdu dreingir.

21 Tá var veður á sjónum hart,
ódnin mátti kallast,
so stýrir hann Gongurólvur
á hvørgum borði hallar.

Ferðin til risahellið á Trøllabotni:

32 Gingu fullar átta dagar,
frysti jøkilstræti,
hvør sum kemur í tílíka neyð,
hann missir gleði og kæti.

33 Niður settist Illgerðsteinur,
kólna tók hendur og føtur.
»Tað sær eg,« segði Gongurólvur,
»tú bíður tess ikki bøtur.«

34 »Verður tær tess eyðið
tú kemur til Nøríkis heim,
heilsa báði vinum og frændum,
kanst tú málagrein.

35 Her gravi eg mítt gull og fæ,
tað man ongan saka.«
Tá kvaðst við á baki hans:
»Eg skal burtur taka.«

36 Tí svaraði Gongurólvur
bukkaði niður til knæ:
»Svøri tann eið á mína trú,
nú havi eg byrðar tvær.«

37 Gingu fullar átta dagar,
frystir við jøkilstíg,
hvør sum kemur í tílíka neyð,
hann lær ikki allan tíð.

38 Niður settist Ódnarbjørn,
kólna tók hand og fót.
»Eya meg,« segði Gongurólvur,
»tú bíður tess ikki bót.«

39 »Verður tær tess eyðið,
tú kemur til Nøríkis líð,
heilsa bæði vinum og frændum,
tú lov ikki roynsi mítt.

40 Her gravi eg mítt gull og fæ,
tað man ongan saka.
Tá kvaðst við á baki hans:
»Eg skal burtur taka.«

41 Tí svaraði Gongurólvur,
bukkar niður til kníggja:
»Svøri tann eið á mína trú,
nú havi eg byrðar tríggjar.«

42 Tá eykast honum Gongurólvi
meiri angist og vandi,
tá ræð hann í átjan dagar
í kolmyrkri ganga.

43 Rólvur gekk tá átjan dagar,
langa leið og drúgva,
eld sá hann í fjalli brenna
høgar neistar flúgva.

44 Grevur hann gull í sterkan heyggj,
tekur nú trøllum at banna:
»Liggi aldur og allar ævir,
njóti tín eingin manna.«

45 Grevur hann gull í sterkan heyggj,
tekur nú trøllum at blóta:
»Ligg her aldur og allar ævir,
eingin skal tín njóta!«

46 Tí svaraði Gongurólvur:
»Úti má ikki standa,
hvørt her byggja trøll ella fólk,
eg fari har inn at ganga.«

47 Rólvur gekk í skálan inn,
sum stór sat kona við eld,
»Vesalur vættur, dvølst hjá mær,
og verm tín frosin feld«

48 Vesalur vættur, dvølst hjá mær,
og verm tín frosin bein,
kemur hann Rosmar risin heim,
hann sprytar teg upp á tein!«

49 Hon reiv av honum frosna váð,
setti at eldi at dasta,
glerið lá um beinini niðri,
ei var í gulli glæstrað.

50 »Tað sær eg á tínum eygum,
tó at tú ert av menskum monnum,
sig mær frægur eiti títt,
og hvaðani ert tú av sonnum.«

51 »Eg eri alin í Íslandi
við alskyns mekt og prýði,
nevndan hoyrdi eg faðir mín,
Máur æt hann á Mýri.«

52 »Er hann so sannur faðir at tær,
sum tú hevur fyri mær nevnt,
ónt hevur teg av leiðini borið,
óbeint hevur tú stevnt.

53 Er hann so sannur faðir at tær,
sum tú hevur fyri mær svorið,
samborin eru vit systkin tvey,
bæði til kalls og konu.

Samanumtøka í kvæðinum, har Rólvur greiðir frá ferðum sínum:

114 Kongurin talar til sínar menn,
biður teir allar tiga:
»Gevið kalli ljóð um stund,
hann kann frá ferðum siga!

115 Tí svaraði Gongurólvur,
ræður so orðum byrja:
»*Fyrst er at geva manni mat*
og síðan tíðindi spyrja.«

116 Tey bóru honum fram oksalær,
flykkini tólv av sviní,
tunnubreyð og laksir sjey
og bollaskál av víni.

117 Tey bóru honum fram oksasíðu,
betur kundi hann ikki velja,
svøri tann eið á mína trúgv,
tá kvaðst Rólvur at selja.

118 »Oftum havi eg í vási verið,
stundum uppi í ský,
hvør sum míni fótspor stígur,
lær ikki allan stund.

119 Oftum havi eg í vási verið,
stundum niðri á grunn,
hvør sum míni fótspor stígur,
lær ikki allan stund.

120 Seks vetur var eg í Trøllabotnum
í tann risans ranni,
inntil hann hin sjeynda
tá legði eg ást við Svannu.

121 Tríggjar nætur á Moyggjaland,
fari til dømar at taka,
har við bygdist heimurin,
at kvendi fekk sín maka.«

122 Svaraði signaður Ólavur kongur,
bæði við bold og ræði:

»Um tú livir annað slíkt,
eg gevi tær kost og klæði.«

123 Tí svaraði Gongurólvur,
gerst nú ný[t]ur drongur:
»Fáið mær prest at skrifta mær,
eg vil ikki liva longur.«

124 Nevndu teir tann unga Rólv,
fagran og so fríðan,
tá ið hann kom úr funti upp,
tá læt hann sítt lív.

125 Tí varð hann kallaður Gongurólvur,
eingin hestur hann bar,
kinnin var reyð sum hummarklógv,
tá ið sólin roðar í kav.

Sambandið millum kvæðaskaldskap og veruleika er annars eitt ógvuliga áhugavert evni, sum vit vita alt ov lítið um, sæð úr samtekstarjónarmiði, og tað vil siga her upplýsingar um, hvussu brúkararnir av kvæðaskaldskapinum hava skilt innihaldið í kvæðunum í mun til sína veruleikauppfatan, sum ikki altíð samsvarar við veruleikauppfatanina hjá okkum, sum granska kvæðini. Serliga forvitnisligt er tað her at kanna henda spurning í sambandi við kappakvæði okkara, sum fyri nútíðarmenniskjum flestum eru líka fjar frá veruleikanum sum ævintýr okkara, ið eingin trýr uppá – uttan kanska smábørn. Fyri at lýsa nærri uppfatanina av veruleikainnihaldinum í trimum kappakvæðum skal eg endurgeva tað, sum eg sjálvur havi hoyrt av manna munni.

Leivur Tróndarson sáli segði fyri mær frá einum tilburði, sum hann sjálvur hevði upplivað, meðan hann var lærari í Suðuroy, tað er 1938-43, í grind í Fámjin. Hann hevði verið í grindadansi, har eisini »Seyðaríman« varð kvøðin, og um náttina, tá ið hann kom aftur í tilhaldshús sítt í Fámjin, har ein gomul kona búði, nevndi hann fyri henni okkurt av tí, sum hevði verið kvøðið. Tá ið hon hoyrdi navnið á »Seyðarímuni«, bað hon Leiv koma út fyri dyr, fyri at hon kundi vísa honum á, hvar hendingarnar í kvæðinum vóru farnar fram. Leivur segði seg ikki kunna gloyma, tá ið hann stóð við hesi gomlu konu úti í túninum, og hon peikaði niðan í fjallið, har Skrukkan roytti grót oman yvir Gest, Tóra og Hálvahala. – »Seyðaríman« er eisini fortald sum ævintýr í Norðuroyggjum, samanber til dømis »Risabrúdleypið«[21]), og tað er helst hesin siður at fortelja aftur kvæði sum søgur, ið hevur skapt gróðrarlíkindi fyri, at hendingarnar úr teimum eru vorðnar knýttar at kendum plássum í bygdini, og í døminum úr Fámjin var tað *Tórðarurð*.

Jákup hjá Billu sáli í Skúgvoy segði fyri mær, at Tummas í Kárastovu, ið livdi í 19. øld og búði í Húsavík, hevði fingið dreymmann, og tá ið dreymmaðurin kom til hansara, varð tað fyrsta, Tummas bað hann gera fyri seg, at lata seg síggja Runsivalsstríð. Tá Tummas fekk at síggja stríðið og tólvjavningar ríða eftir Bøfløtu við Rólanti á odda í brotnum hjálmi og alblóðigum upp undir hendur, orkaði Tummas ikki at síggja meir og vendi sær burtur.

Meðan eg gekk í skúla í Havn 1940-42 og seinni arbeiddi í Sjóvinnubankanum 1943-46, hoyrdi eg Janus Djurhuus sála fortelja um einaferð, hann hevði ferðast við sumbingum, ið høvdu verið til skips, at teir høvdu kvøðið »Hábarðskvæði« á framdekkinum á ferðamannaskipinum. Tá ið teir vóru lidnir við kvæðið, fór Janus til teirra og spurdi, um teir nú trúðu, at Hábarð hevði livað. Tá vendi ein teirra bakið móti Janusi og segði við hinar við

vanvirðing: »Hvaðan er hatta av landi skotið, sum ikki trýr, at Hábarð hevur livað.« – Tað var týðuligt, at hetta svarið frøddi Janus bæði sum skald og langabbason Sjóvarbóndans.

Fara vit longri aftur í tíðina, eitt nú seinmiðøld, tá ið elstu kappakvæði okkara ætlast at vera yrkt, hava vit tíverri ongar samtekstir, sum kunnu siga okkum beinleiðis, hvussu fólk tá hava mett markið millum skaldskap og veruleika í slíkum yrkingum. Hinvegin er tað ikki óhugsandi, at svarið upp á henda spurning kann óbeinleiðis finnast í samtekstum, ið eru varðveittir til norrønar fornaldarsøgur, ið kappakvæði okkara eru so nær skyld við viðvíkjandi evni, stíli og anda. Ein áhugaverdan slíkan samtekst hava vit soleiðis frá Sverra kongi, ið livdi 1150-1202 og var sum kunnugt uppvaksin í Føroyum. Einaferð hann sum kongur í Noregi hoyrdi fornaldarsøguna um Hrómund Gripsson, skuldi hann siga: at slíkar *lygisøgur* vóru stuttligastar, men at tað kortini vóru fólk, ið kundu føra ætt sína aftur til Hrómund Gripsson. Av hesum svari skilja vit, at tó at Sverri sjálvur metti fornaldarsøgur fyrst og fremst sum skaldskap, var honum greitt, at tað vóru onnur fólk í hansara samtíð, sum mettu hetjuna í søguni at vera ein sannsøguligan persón. Eitt annað áhugavert dømi finna vit í formælinum til ta íslendsku fornaldarsøguna um Gǫngu-Hrólf, ið ljóðar soleiðis í føroyskari týðing:

Mangar frásagnir hava menn sett saman monnum til skemtanar, summar eftir fornbókum ella fróðum monnum og stundum eftir fornum bókum, sum í fyrstuni hava verið skrivaðar í stuttum máli, men sum síðan meiri hevur verið lagt aftrat, tí alt hevur ikki verið sagt, sum hent hevur. Verða menn javnan ymsir á máli, tí at tað er ofta, at *ein* sær og hoyrir og *annar* ikki, tó at teir eru við sama tilburð staddir. Tað er eisini náttúran hjá mongum fávitskutum monnum, at teir trúgva einans tí, sum teir síggja við sínum eygum og hoyra við sínum oyrum, men at teimum tykir at vera fjarlagt síni náttúru, slíkt sum hevur verið um vitra manna ráðagerðir ella miklan alv ella frálíkan fimleika hjá reystmonnum og ikki síðst um kunstur og miklan gandamátt, tá ið teir ristu móti summum æviliga óeydnu ella deyða og summum veraldar virðing, fæ og heiður. Teir østu stundum frumkreftir, men stiltu tær stundum, so sum Óðin ella aðrir, ið av honum lærdu galdurlistir ella læknakynstur. Tað finst har eisini dømi um, at summir menn hava havt røring av innblástri frá óreinum anda, so sum Oyvindur kinnriva í Ólavs søgu Trygvasonar ella Einar skarvur ella Froyur, ið Gunnar helmingur drap í Svíaríki. Nú verður hvørki hetta ella annað gjørt øllum til vildar, tí at ongum tørvar at leggja trúnað á slíkt, meira enn hóskiligt tykir. Tað er eisini best og fródligast at lýða á, meðan frá verður sagt, og heldur at gera sær gleði av tí enn harm, tí at vanligt er, at maður hugsar ikki um aðrar syndugar lutir, meðan hann gleðist av skemtanini. Tað sømir heldur ikki væl teimum, ið hjá eru, at lasta, tó at ófródliga ella ómjúkliga er tikið til orða, tí at fátt verður fullvandaliga gjørt, tað ið ikki meira um varðar enn slíkir lutir.

Tilvísingar

1. Svabos færøske Visehåndskrifter, útg. Chr. Matras, Kmh. 1939, bls. 494.
2. Jóhannes í Króki: Sandoyarbók I, útg. R. Long, Tórshavn 1968, bls. 145.

3. = 1, bls. 383.
4. L. Heggstad og H. Grimer Nielsen: Utsyn, nr. 9: Rolf Ganger.
5. Å. G. Blom & O. Bø: Norske Ballader, Oslo 1973, bls. 109.
6. E. G. Geijer & A. A. Afzelius: Svenska folkvisor, Stockholm 1880, nr. 90.
7. Anders Sørensen Vedel: It Hundrede vduaalde Danske Viser, 1591.
8. Danmarks gamle Folkeviser, útg. S. Grundtvig [m.fl.], I-XII, København 1853-1976, nr. 41 A, B og C.
9. = 8, (DgF II, bls. 77-79).
10. Prentað 1608.
11. Maal og Minne 1937, bls. 81-129.
12. Norske trollvisor og norröne sogor, Kristiania 1915.
13. Fornaldarsögur Norðurlanda. Útg. Rafn 1829-30.
14. Islandske Annaler indtil 1578, útg. Gustav Storm, Kristiania 1888, Oslo 1977, s. 222, 274 og 402.
15. = 4 (Utsyn 3); The Types of the Scandinavian Medieval Ballad, 1978 (TSB E 140).
16. Stith Thompson: Motif-Index of Folk-Literature. F112 Land of Women/Land of Maidens.
17. = 15 (TSB E 97).
18. Færøske Folkesagn og Æventyr II v. Jakob Jakobsen. Kbh. 1898-1901, nr. 89, bls. 232.
19. Jóannes Patursson: Kvæðabók. Tórshavn 1922, bls. 156.
20. = 8 (DgF II s. 82).
21. = 18, bls. 253-259.